# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Magni Joensen, Tórshavn:

## 30 ára starvsdag hjá Føroya Tele



Fríggjadagin 30. mars hevði Magni Joensen á FT-Samskifti 30 ára starvsdag hjá Føroya Tele, har hann arbeiðir við viðlíkhaldi av allari telefoni, bæði mobil og fastnet.

Magni er 51 ára gamal og ættaður av Sandi. Hann lærdi til elektrikara hjá P/F Leif Mohr. Eftir at hann varð útlærdur í 1974, arbeiddi hann sum elektrikari eina tíð, til hann kom í starv hjá Føroya Tele í 1976.

Foreldrini hjá Magna eru: Poulina, f. Augustinussen, ættað úr Vági, og Hans Vilhelm Joensen (1927-2004), ættaður úr Hvalvík og vaks upp á Sandi. Magni eigur eina yngri systir, Sólgerð, (g. á Bakkanum), sum eisini býr í Havn.

Tá Magni byrjaði hjá Telefonverki Føroya Løgtings, var tað við Tinghúsvegnum, og útgerðin var tann sama, ið varð sett upp, tá telefonin í Havn varð automatiserað í 1953.

Magni hevur verið við í allari broytingini frá analogum skipanum til talgildar skipanir. Hann trívsist væl í hesum starvi við nógvum nýggjum avbjóðingum, og nógv nýtt er á veg. Hann arbeiddi á Tinghúsegnum øll árini til Føroya Tele flutti í nýggja bygningin í Hoyvík.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jóhan Mørkøre, Hósvík**, andaðist í heiminum sunnudagin 2. apríl, 88 ára gamal.

**Arne Tausen, ættaður úr Hovi**, búsitandi í **Havn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 3. apríl, 83 ára gamal. .

**Stig Jacobsen, ættaður av Glyvrum**, búsitandi í **Julianehaab**, andaðist leygardagin 1. apríl, 56 ára gamal.

**John Apol, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 31. mars, 56 ára gamal.

**Osvald Hansen**, fyrrverandi verkmeistari, ættaður frá **Gjógv**, búsitandi í **Havn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 1. apríl, 68 ára gamal.

## Konfirmantarnir í oktober 1905



Konfirmantarnir 1. oktober 1905. Tað blivu 26 konfirmantar fermdir í Havnar kirkju tann 1. oktober 1905, 9 gentur og 17 dreingir.

Á myndini eru 9 gentur og 16 dreingir, t.v.s. at ein drongur hevur ikki verið hjá fotografi saman við hinum konfirmantunum tann dagin.

Verri er, at vit bert kenna nøvnini á tveimum av konfirmantunum, teir eru: næstfremsta rað, nr. 3 f.v.: Else Frederikke Danielsen (Hestur), og so kenna vit gentu nr. 2 f.v. í fremstu røð, hon er Sigrid Marie Simonsen (Norðradalur).

Vónandi kunnu lesararnir hjálp okkum við at navngeva restina av konfirmantunum. Tey, sum ikki eru navngivin á myndini eru: Cathrine Sofie Petersen, Christian Dam, Peter Edvard Arge, Peter Vilhelm Jørgensen, Joen Andreas Rasmussen og Axel Henriksen, hesi vóru øll úr Havn. Aðrir konfirmantar vóru: Johanne Malene Jacobine Joensen, Anna Margrethe Dagmar Ejde, Ole Cornelius Christian Hansen og Johannes Ferdinand Poulsen, øll úr Nólsoy og hini vóru: Peter Jacob Sivart Petersen (Hestur), Thomas Martin Zakariasen (Hestur), Henriette Susanne Jacobsen (Kaldbak), Else Cathrine Niclasen (Velbastaður), Johanne Thomeline Marie Frederikke Nybo (Hvítanes), Andrea Sofie Mortensen (Argir), Andreas Vilhelm Sofus Nybo (Hvítanes), Mikkel Johannes Michelsen (Velbastaður).

Og so eru tað nakrir konfirmantar, sum ongan bústað hava, teir vóru: Christian Mourits Edvard Jacobsen, Mikkel Pauli Jacobsen, Peter Johannes Niclasen, Johan Pauli Samuelsen, Daniel Danielsen og Jacob Hans Jacobsen.

Tey sum kenna konfirmantar á myndini ella liggja inni við øðrum upplýsingumí hesum sambandi vera vinarliga biðin um at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon 214647 ella 314647.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá kæra mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Sonja Mortensen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Ein serlig tøkk til starvsfólkið á deild 7
á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til Sverra Steinhólm, prest, og øll tykkum,
ið á annan hátt hjálptu til.

Familjunnar vegna
**Johanna og Elsa**

## Listaframsýning á Argjum

Mánadagin 10. apríl letur Harald Dirks upp listaframsýning í Andrassarstovu á Argjum. Opið er fram til páskaaftan 15. apríl. Tó er stongt langafríggjadag.

Harald Dirks er dani, sum hevur verið nógv í Føroyum, og eru myndir hansara, málningar og tekningar, eisini merktar av Føroyum.

**Dagurin í morgin**

**5. apríl. Irene**, deyð umleið ár 300. Tikin av døgum saman við tveimum systrum. Navnið merkir friður.